FØROYA LÆRARASKÚLI

## NÁMSLIGA ÚTBÚGVINGIN

### *Vilt tú vera pedagogur?*

Nýggjur flokkur verður tikin upp eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf.313501) og á heimasíðuni: www.flsk.fo

Skrivstovan er opin kl. 8.00 - 16.00.

Treytirnar fyri upptøku á námsligu útbúgvingina eru, at umsøkjarin umframt at hava gingið 9 ár í skúla hevur staðið HF-prógv, studentsprógv, hægri handilsskúlaprógv, hevur lærlingaútbúgving, ella kann prógva samsvarandi kunnleika.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur starvast í dag- ella bústovni í minsta lagi 1/2 ár.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 18. juni.

***NÁMSLIGA ÚTBÚGVINGIN***
***- Ein útbúgving fyri lívið***

Mentamálaráðið
KT-DEPILIN

## KT-RÁÐGEVI

**Starvið**
Mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum, ágrýtnum og engasjeraðum KT-ráðgeva til KT-depilin. Starvið verður at seta 01. august 2007.

**Høvuðsuppgávurnar eru m.a. at:**
- umsita ambætarar
- umsita heimasíðu depilsins og stuðla skúlum við teirra heimasíðum
- skipa fyri skeiðum
- skipa samarbeiði millum skúlar
- menna talgilt undirvísingartilfar og talgildar undirvísingargongdir
- veita brúkaratænastu

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar
- hava útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving
- útbúgving ella drúgvar royndir á telduøkinum
- hava royndir í undirvísingarverkinum
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt umframt at samstarva í arbeiðsbólkum o.l.
- eru tænastusinnaðir, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir.

**Vit bjóða**
Á økinum eru fleiri spennandi avbjóðingar, sum KT-ráðgevin kemur at fáa ávirkan á. M.a. verður arbeitt við at seta í verk skúlafyrisitingarforritið VITANET. Frammanundan røkir KT-depilin brúkarasamskiftið í sambandi við Lønarforskipanarforritið.

Starvið er áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnar fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegi 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella e-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 21. mai 2007, klokkan 16.00.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, ber til at ringja til Regin Ellingsgaard, leiðara í KT-deplinum, telefon 321220 ella 555015. Regin hevur e-postin reginel@skulin.fo

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur ráðið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**KT-depilin** er staðsettur í Mentamálaráðnum og veitir sjálvstøðuga KT-tænastu í skúlaverkinum. KT-depilin er ráðgevandi hjá skúlaverkinum viðvíkjandi kunningartøkni og skipar fyri at eftirútbúgva lærarar í kunningartøkni. KT-depilin rekur samskiftisskipan skúlaverksins, sum nú hevur 13.970 brúkarar. Eisini veitir KT-depilin skúlum pláss til heimasíður teirra.

FØROYA LÆRARASKÚLI

## LÆRARAÚTBÚGVINGIN

### *Vilt tú vera lærari?*

Nú er greitt at søkja áLæraraskúlan eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf.313501) og á heimasíðuni: www.flsk.fo

Skrivstovan er opin kl. 8.00 - 16.00.

Treytin fyri upptøku á læraraútbúgvingina er studentsprógv, HF-prógv ella prógv á líknandi stigi.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 18. juni.

***LÆRARAÚTBÚGVINGIN***
***- Ein útbúgving fyri lívið***

Øll søla og tiltøk, sum skulu vera á ólavsøku ella lýsast í ólavsøkuskránni í ár, skulu nýta serligt umsóknarblað. Umsóknarblaðið fæst í Snarskivuni og á heimasíðu kommununar.

Freistin at flýggja inn umsóknarblaðið er sett til týsdagin 18. juni 2007 kl. 12.00.

Umsóknir, sum koma inn aftan á 18. juni 2007 kl. 12.00, verða ikki viðgjørdar.

**www.torshavn.fo**

